Dimmalætting
Fríggjadagur
Nr. 198 • 118. árgangur • 29. desember 1995 • Tlf. 11212 • Fax 10941
– ÁLÍTANDI TÍÐINDI
7kr.

»Okkara Gulu« í blaðnum í dag

# Olaf Olsen: Fleiri skip fara av knóranum í 1996

**Íløgustuðul:** Tað fer at níva hart hjá teimum 23 partrolarunum, ið nú skulu klára seg uttan íløgustuðul, sigur reiðarin hjá teimum sjey cubatrolarunum, Olaf Olsen. Ein avleiðing er, at upsafiskiskapurin fellur púrasta burtur.

Niclas Johannesen

Tað stendur í fíggjarlógaráltinum fyri 1996: »Landsstýrisins meting er, (...) at hesin partur *(23 partrolarar og 11 stállínuskip, blðm.)* av feskfiskaflotanum kann greiða skyldur sínar, hóast íløgustuðulin fellur burtur.«

Hetta gongur ein alstórur meirluti av løgtinginum inn fyri. Bara fólkaflokkurin hevur atkvøtt ímóti fíggjarlógini, við eitt nú teirri grundgeving, at vantandi íløgustuðulin tekur botnin undan vinnuni.

Olaf Olsen, reiðari á cubatrolarunum, ivast ikki:

– Nøkur skip fara ikki at klára seg komandi ár. Og nøkur fiskasløg verða als ikki fiskað. Talan verður rætt og slætt um, at upsafiskiskapurin fellur burtur, tí tað loysir seg ikki at fiska upsan, sigur hann.

– Skipini eru slitin niður. Tú klárar ikki at halda tey viðlíka; hvaðna verri er tað at skifta nakran flota út.

Prinsippielt er Olaf Olsen fyri, at høvuðsvinnan skal klára seg uttan stuðul. Men hann sigur, at tá eitt nú Noreg stuðlar fiskivinnuni við fleiri ymiskum studningsskipanum, so klára føroyingar seg ikki í kappingini.

Úrslitið hjá cubatrolarunum fyri 1995 vísir annars, at hesi skipini klára seg. Men talan er um gomul skip, sum krevja nógv viðlíkahald. Og viðlíkahaldið er ikki ókeypis – tað kostar.

Hvørt av skipunum hevur fingið ein árligan stuðul upp á 570.000, og hvørt skipið hevur avreitt fyri 6 mió. kr. í ár.

Men við teimum hjáveiðuregulerungum, sum valda, megna skipini ikki at vera til fiskiskap teir átta mánaðirnar, sum eftir eru av kvotuárinum. Hetta, hóast løgtingið hevur samtykt at økja toskakvotuna við 8.500 tonsum

– Okkara hjáveiðukvota av toski, sum var grundað á 10.000 tons, varð uppfiskað eftir bert fýra mánaðum. So økingin munar ikki nóg mikið, sigur Olaf Olsen.

## Í BLAÐNUM Í DAG



### George Weah vann »Gylta Bóltin '95«

Framman fyri spælarar sum Klinsmann, Litmanen, del Piero og Kluivert er liberiski George Weah av ítróttarskrivarum í øllum Europa kosin besti fótbóltsspælarin

Síða 7

### Føroysku bilarnir nýggjar plátur

Tann 1. januar 1996 fáa nýggju føroysku bilarnir eitt nýtt slag av nummarspjøldrum í staðin fyri tey hvítu »F-spjøldrini«, sum hava verið brúkt seinastu tjúgu árini. Tær nýggju pláturnar hava eitt sokallað altjóða snið.

Síða 4

### Skjótt er skitið verk

Nevndarlimur í Lærarafelagnum sipar til uppskotið um nýggja fólkaskúlalóg. Henda fólkaskúlalógin verður bert ein viðfáningur, um ikki lærararnir fáa betri stundir at viðgera álitið. Fríggjadagin 19. januar er seinasta freistin hjá lærarum at koma við viðmerkingum til uppskotið til Landsskúlafyrisitingina.

Síða 3

### Skúlagongd í heimbygdini ikki longur ein sjálvfylgja

Størru skúlarnir eru bíligari at reka, tí lærarakreftirnar kunnu brúkast meira rationelt, sigur landsstýrismaðurin við skúlamálum. Kortini verða allir bygdaskúlar ikki niðurlagdir, men tað verður ikki longur ein sjálvfylgja at kunna ganga í skúla í heimbygdini.

Síða 3

### Tríggjar milliónir narkomanar í Pakistan

Hóast veturin er farin at gera um seg í Pakistan, so síggjast flakkandi narkomanar í rivnum og skrøddum klæðum ganga runt við einum oljudunki í hondini. Teir mýkja voddar hjá kundum fyri eitt sindur av peningi, so teir hava ráð at keypa sær narkotika.

Síða 5



*Palestinskir politistar við einum palestinskum flaggi á veg upp um múrin á nú fyrrverandi ísraelsku høvuðsstøðini í Ramallah. Mikudagin fóru ísraelar úr býnum eftir 28 ára drúgva hertøku* Mynd: REUTER

## Palestinar fingið aftur Ramallah eftir 28 ára hertøku

Vónirnar um framtíðina millum palestinar á Vestara Áarbakka eru góðar, eftir at ísraelska hertøkan síðstu 28 árini er av. Roknað verður við, at Vestari Áarbakki kann gerast áhugaverdur hjá teimum, ið hava hug at gera íløgur.

Hilmar Jan Hansen

(REUTER) Í hesum døgum fegnast palestinar á Vestara Áarbakka ófört, eftir at ísraelska hertøkan av býnum Ramallah, ið hevur vart í 28 ár, er av. Innan fyri tveir mánaðir hava ísraelar slept hertøkuni av tilsamans seks býum.

Mikudagin fóru síðstu av ísraelsku hermonnunum úr økinum, og so skjótt sum tað var hent, sóust fegnir palestinar dansa í gøtunum, har teir áður hava mótmælt og skipað fyri ymsum tiltøkum, ið ikki altíð hava verið so friðarlig.

Samstundis vænta palestinar, at framtíðin er bjørt hjá býnum, sum kann gerast ein fíggjarligur og vinnuligur miðdepil í økinum.

– Tá fólkið ikki longur kennir seg kúga av hertøkuni, samstundis sum javnvág kemur í sinnini, eru útlitini nógv betur fyri, at hugurin at fara til arbeiðis barnar, sigur Anton al-Habash, ið er matframleiðari.

– Og um alt gongur, so sum vit vóna tað, eru eisini útlit til, at onnur fara at leita sær hendanvegin at gera íløgur, ið kunnu vera við til at skapa og tryggja arbeiðspláss. Tað kemur at gera lívið lættari hjá okkum øllum.

Býurin Ramallah, sum í 1967 varð hersettur – eins og restin av Vestara Áarbakka – liggur bert tólv kilometrar frá Jerusalem. Í Ramallah og tí minna grannabýnum al-Bireh búgva tilsamans 75.000 fólk.

– Í áravís hava vit bíðað eftir einum høvi at fáa búskaparligan vøkstur í gongd her, og nú sær út til, at dreymur okkara langt um leingi fer at gerast veruleiki, sigur Mustafa al-Shini, ið er sólhitaframleiðari.

– At ísraelar avmarkaðu bæði innflutning og útflutning á Vestara Áarbakka, forðaði fyri allari menning í økinum. At vit nú ráða okkum sjálvum, fer vónandi at gera alt bíligari hjá bæði brúkarum og framleiðarum.

Eisini á øðrum økjum er ein glotti at hóma fyri Ramallah, tí PLO-leiðarin Yasser Arafat hevur umhugsað at hava býin sum sítt nýggja høvuðssæti. Hetta fer væntandi at hendan innan fyri eitt ár ella so.

## Beindu fyri »kavafjøllunum« í miðbýnum í høvuðsstaðnum

Tíðliga í gjáramorgunin fór Tekniska Deild hjá Tórshavnar Kommunu í holt við at rudda kavan burtur úr miðbýnum. Eftir lítlari løtu vóru risahøgu »kavafjøllini« horvin.

Í Havnini var kommunan farin at rudda dúgliga í gjár. Longu frá morgunstundini vóru gravkýr og kavaplógvir í gongd, og høvdu tær fingið ruddað tað mesta burtur, áðrenn fólk fóru til arbeiðis.

Risahøgu kavarúgvurnar, ið vóru at síggja nógvastaðni runt um í miðbýnum, hvurvu so við og við, sum dagurin leið.

Boð vórðu send eftir lastbilum at flyta kavan burtur, soleiðis at framkomandi var.

Ikki vóru mong ferðsluóhapp í býnum. Onkur bilskaði hendi, men ikki tað nógva, tí mong lata bilarnar standa, umframt at fleiri bileigarar hava jólafrí. Onnur ansa væl eftir, tá farið verður út í ferðsluna, um tað so er til gongu ella á hjólum.

Á Politigarðinum í Havn hava teir verið boðsendir í onkrum førum í sambandi við húsaófrið.

B.



*Økið á Drelnesi, har oljuútgerðarhavn verður, er í stóran mun byggibúgvið.*

## Oljuútgerðarstøð á Drelnesi: Lærið av hetlendingum – hvussu ikki skal gerast!

Pól á Kletti

Økið á Drelnesi, har oljuútgerðarhavn verður, er í stóran mun byggibúgvið. Á staðnum er smiðjuvirksemi, sum tørvur er á í sambandi við eina útgerðarhavn.

Men hóast hetta, so er havnanevndarformaðurin á Tvøroyri, Ejler Djurhuus, ikki hugaður at vit bjóða útlendskum oljufyritøkum hendanvegin fyri einhvønn prís:

– Tað er vandi í hvørjari vælferð. Útlendskar oljufyritøkur mugu ikki bert sleppa at gera, sum teimum lystir. Hetlendingar hava fingið stórar inntøkur av oljuni, men hendan vinna hevur eisini havt ávísar óhepnar fylgjur við sær. Vit eiga at læra av mistøkum hjá øðrum, áðrenn vit gladbeint bjóða útlendskum oljufyritøkum vælkomnum. Tær eru ríkar, vit fátæk, heldur Ejler Djurhuus.

Lesið á síðu 4

FARVE